# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 22
November 2014

ISSN 1603-0036



## Nýggjar frímerkjaútgávur:
- Magna Carta 800 ár
- Kvinnur valrætt í 100 ár
- Vága Floghavn
- Ferðin hjá Clayton Atkinson í 1833

Posta
FAROE ISLANDS







FO 800 Royndarprent

# Magna Carta 800 ár

Í juni 2015 eru 800 ár liðin síðan eitt hitt týdningarmesta skjalið í heimssøguni, Magna Carta, varð staðfest við innsigli á meyrulendinum Runnymed í Berkshire. Skjalið var úrslitið av friðarsamráðingum millum John kong I og teir barónar, ið høvdu gjørt uppreistur móti hansara kúgandi stýri.

**John kongur**

Tá enski kongurin Richard I (Richard Leyvuhjarta) doyði í 1199, gjørdist yngri bróður hansara John (1166 – 1216) kongur av Onglandi. Við í sekkin fekk hann Írland og stórar partar av Vesturfraklandi. Í 1202 brast kríggj á millum John kong og franska kongin Philip II (1165 – 1223), og endin av hesum stríðnum var, at John kongur misti fronsku landspartarnar í 1204.

Komandi tíggju árini brúkti John kongur alla sína orku til at vinna mistu ognirnar aftur. Tá John og hansara sameindu taptu endaliga stríðið við Bouvines í 1214, hevði hann mist álitið og skapt so miklan ótta og fíggindaskap millum sínar álitismenn, barónarnir, at teir framdu uppreistur móti honum.

**Uppreisturin hjá barónunum**

Drúgva kríggið millum John kong og fraklendingar hevði skapt politiskan hurlivasa í Onglandi, orsakað av alt ov høgari skattabyrðu og ráari kúgan. Ónøgdin við kongin vaks í stórum og førdi at enda til beinleiðis uppreistur móti honum. Tá John kongur kom heim aftur, eftir endaliga ósigurin við Bouvines, varð hann móttikin við kravi um umfatandi ábøtur frá teimum barónum og óðalsmonnum, sum annars vóru kjarnin av hansara valdstøðu sum kongur. Partarnir hittust á Runnymede við Thames, millum Windsor og Staines í 1215 – og tað var her at fyrsta frábrigdi av Magna Carta varð framlagt og váttað við kongsins innsigli.

**Magna Carta**

Orsøkin til at Magna Carta var so kollveltandi er, at man her fyri fyrstu ferð á skrift royndi at avmarka valdið hjá konginum. Hugskotið var at gera eina ófrávíkiliga lógfesting, sum eisini fevndi um kongsvaldið og forðaði fyri at kongurin kundi misnýta sítt vald. Í skjalinum vóru partar, sum fevndu um rættindi hjá einstaklingum og bólkum – og teksturin fór





John kongur og innsiglið hansara.

enntá so vítt sum at krevja, at barónarnir skuldu kunna taka valdið frá konginum um hesin fór út um lógarinnar mark.

Tað vóru 63 klausular ella treytir í upprunaútgávuni av Magna Carta. Flestu teirra eru um tillaging av ymsum feudalum siðum og ættindum, reglugerð fyri býir, handil og kongaligu skógirnar. Harafturat eru reglugerðir fyri afturgjald av skuld og rættindi hjá kirkjuni. Men teir mest týðandi partarnir eru um løgfrøðilig rættindi hjá einstaklinginum mótvegis statinum og skerjingin av valdsrættinum hjá kongsvaldinum.

John kongur helt ikki krøvini í Magna Carta og longu áðrenn tríggir mánaðir vóru gingnir, fekk hann pávan Innocent III at ógilda skjalið. Men sáðið var longu farið at spíra. Teksturin í Magna Carta var farin um alt landið og hugskotini høvdu vakt ans. Borgarakríggj brast á, har flestu av barónunum stríddust fyri prinsippunum í Magna Carta. Teir fingu franska krúnprinsin Louis at játta at gerast kongur av Onglandi og tann skotska kongin Alexander II til at hertaka norðara partin av Onglandi.

Í 1216, tá uppreistrarmenninir høvdu tikið meginpartin av landinum, doyði John kongur brádliga av blóðsótt. Teir fáu royalu stuðlarnir avgjørdu tí, saman við umboðnum fyri pávan, at útnevna níggju ára gamla krúnprinsin Henry til kong – og sendu brøv til leiðararnar av uppreistrinum í kongsins navni, har teir góðtóku krøvini í Magna Carta og mæltu barónunum til at stuðla Henry III. Um hetta mundið var ósemja íkomin millum Louis og uppreistrarmenninar og teir flestu av barónunum skiftu tí síðu og stuðlaðu barnakonginum.

**Framhald**

Í tíðini fram til at Henry kongur kom til lógaldurs, varð Magna Carta váttað og umskrivað fleiri ferðir. Skjalið var nú kent um alt landið og hugskotini festu so líðandi rót. Tann umstríddi parturin um at kongurin kundi




*Bakgrundin á frímerkinum er brot úr avskrift av 61. klausuli í upprunaliga Magna Carta skjalinum frá 1215. Hesin klausulur sigur, at barónarnir kunnu seta kongin frá ella undir eftirlit um hesin fer út um mark ella misnýtir sítt vald. 61. klausulur varð, sum vera man, tikin burtur í seinni útgávum av Magna Carta – men er spírin til avmarkaða kongsvaldið vit kenna í dag.*
*Aftur at tekstinum er stóra innsiglið hjá John kongi. Svarti teksturin á frímerkinum er avskrift av 39. klausuli, ið sigur at ongin frælsur maður skal rættarsøkjast uttan við óheftan dómstól og sambært landsins lógum.*

verða settur frá av barónunum, varð tó brátt tikin burturúr.

Men komandi tíðina fingu barónarnir størri ávirkan. Í 1258 fekk ein bólkur undir leiðslu av Simon de Montfort tær sonevndu Oxford ásetingarnar í lag, har kongurin í roynd og veru varð noyddur at leggja seg undir eitt ráð av útvaldum monnum.

Oxford ásetingarnar hildu ikki í longdini. Hóast Magna Carta hetta tíðarskeiðið varð nógv broytt – og valdið, ið barónarnir høvdu á konginum, varð bart niður av einari royalari atsókn undir leiðslu av Edwardi krúnprinsi – stóðu flestu broytingar sína roynd, eisini eftir at Edward tók við kongsvaldinum. Tey staðbundnu heimatingini, har lágóðalsmenn og umboð fyri landsbygdirnar savnaðust, hildu áfram at virka. Upp ígjøgnum fjúrtandu øld mentust hesi ting - saman við mótsetninginum av háóðalsmonnum, ið ráðgóvu kongin - til nakað ið líktist tí tveykamars-parlamentinum, vit kenna í dag, við yvir- og undirhúsi.

**Arvurin eftir Magna Carta**

Grundleggjandi hugsjónin í Magna Carta gekk aftur í menningini av tí bretsku statsumsitingini upp gjøgnum øldirnar – og breiddi seg enntá út um landamørk. Hátturin, har okkara egna umsiting er deild upp við lóggevandi, dømandi og útinnandi valdi, hevur partvís sín uppruna í skjalinum, sum í skundi varð samansett á einari lítilsverdari bretskari ong í 1215.

Á frímerkinum hava vit endurgivið best kenda partin úr upprunaliga Magna Carta skjalinum:

*"Eingin frælsur maður skal handtakast, fongslast, gerast útlagin, lýsast friðleysur ella á nakran hátt koyrast á húsagang, ei heldur rættarsøkjast, uttan við lógligan dóm av sínum líkum og landsins lógum!"*

Anker Eli Petersen

# Nýggj postgjøld 01.01.2015

| Brævastøddir | | |
|---|---|---|
| Smábrøv | Miðalbrøv | Stórbrøv |
| 23 x 17 x 0,5 cm í mesta lagi | 33 x 23 x 2 cm í mesta lagi | Longd + breidd + tjúkd í mesta lagi 90 cm |
| 23 x 17 cm | 33 x 23 cm |  |
| 0,5 cm tjúkt | 2 cm tjúkt | l+b+t 90 cm |

## Innanoyggja brøv

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 8,50 | 11 kr | 12 kr |
| 51 - 100 g | | 15 kr | 17 kr |
| 101 - 250 g | | 26 kr | 29 kr |
| 251 - 500 g | | 39 kr | 39 kr |
| 501 - 1000 g | | 51 kr | 51 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 63 kr |

## Evropa og Norðurlond

***A-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 17 kr | 19 kr | 20 kr |
| 51 - 100 g | 22 kr | 24 kr | 26 kr |
| 101 - 250 g | | 44 kr | 44 kr |
| 251 - 500 g | | 71 kr | 71 kr |
| 501 - 1000 g | | 108 kr | 108 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 208 kr |

## Onnur útlond

***A-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 19 kr | 23 kr | 26 kr |
| 51 - 100 g | 23 kr | 36 kr | 36 kr |
| 101 - 250 g | | 68 kr | 68 kr |
| 251 - 500 g | | 90 kr | 90 kr |
| 501 - 1000 g | | 164 kr | 164 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 258 kr |

## Evropa, Norðurlond og A-brøv til Íslands

***B-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 12 kr | 14 kr | 15 kr |
| 51 - 100 g | | 18 kr | 19 kr |
| 101 - 250 g | | 37 kr | 41 kr |
| 251 - 500 g | | 57 kr | 59 kr |
| 501 - 1000 g | | 89 kr | 89 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 115 kr |

## Onnur útlond

***B-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 14 kr | 18 kr | 21 kr |
| 51 - 100 g | | 29 kr | 32 kr |
| 101 - 250 g | | 56 kr | 59 kr |
| 251 - 500 g | | 88 kr | 89 kr |
| 501 - 1000 g | | 129 kr | 143 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 219 kr |







FO 801 Royndarprent

# Kvinnur valrætt í 100 ár

Í 1915 fingu føroyskar kvinnur valrætt. Rættin at velja og harvið rættin at taka beinleiðis lut í fólkaræðinum fingu tær í sambandi við, at danska grundlógin varð endurskoðað og broytt 5. juni í 1915. Konufólk í Føroyum fingu rættindi at velja umboð til bæði tingini í ríkisdegnum, og árið eftir atkvøddi Føroya Løgting fyri broyting í løgtingslógini, og nú fingu kvinnur eisini valrætt til Løgtingið. Fyrstu ferð kvinnur vóru á politiskum vali var til løgtingsvalið í 1918. Men tær høvdu verið á vali í almennari atkvøðugreiðslu til tiltiknu fólkaatkvøðuna í november 1907 um rúsdrekkalógina, tá atkvøtt varð í teimum einstøku føroysku kommununum um loyvi ella forboð at skeinkja vín, øl og brennivín. Og til kommunuval høvdu nakrar longu verið í 1909, í Tórshavn 27. november í 1908.

Kvinnurørsla tók seg upp í USA uml. 1848, og kravið um valrætt var við frá byrjan. Rákið tók seg upp fyri aldaskiftið um okkara leiðir, og Norðurlond vóru fremstar í stríðnum um valrætt og fingu tíðliga henda rætt samanborið við onnur lond. Ógvuliga ymiskt kom stríðið fyri valrætti at ganga fyri seg í ymisku londunum. Í Amerika vóru militantir uppreistrar ikki neyðugir, eins og í Onglandi, har stríðið hevur verið samanborið við trælauppreistur. Gongdin til fullfíggjað fólkaræði lá í hondunum á monnunum, ið høvdu valdið, og teir avgjørdu sostatt, um stríðið hjá slóðbrótarunum gjørdist lagaligt ella strízggið. Í Føroyum var onki stríð um rættindi til kvinnur, tí rættindini at fara á val vóru fyrst og fremst vunnin í Danmark.

Hóast valrætt og valbæri, so sást lítið og onki til konufólk í politiskum høpi nógv tey næstu árini. Støðan hjá kvinnuni í samfelagnum, serliga á arbeiðsmarknaðinum, broyttist nógv í sekstiárunum, og tá tær av álvara komu út á arbeiðsmarknaðin, gjørdust tær eisini sjónligari á politiska pallinum.

Í uppreistrarsinnaðu sekstiárunum og sjeytiárunum vildi kvinnurørslan broyta tær fatanir, ið kannaðu monnum betri rættindi og støður í samfelagnum, og tær vildu skapa solidaritet millum kvinnur og gera upp við ójavnvágina millum kynini. Í sjeytiárunum vóru veruligir lunnar lagdir undir kvinnu-

umboðan í løgtinginum, og serliga kvinnufeløgini kring landið stuðlaðu kvinnum at fara upp í politikk. Við kvinnuumboðan á tingi vóru javnstøðuviðurskifti sett á dagsskránna. Tær fyrstu á tingi fóru undir at skipa fyri kvinnutingum, so føroysk konufólk kundu venja seg við leiklutin sum politikarar. Men tær fingu ikki innivist í Tinghúsinum, ið bert skuldi nýtast til seriøst endamál og ikki til "fjas og fjant", sum ein tinglimur tók til. Kvinnuting vóru so hildin aðrastaðni í Tórshavn í árunum 1979-83 við ymsum kjakevnum og skipað sum ting. Hetta var grasrótararbeiði og ein tíðarmynd, sum tinglimir harmaðust lítið um, tá hon hvarv, sigur fyrrverandi tingkvinna. Hóast kvinnutingið ikki náddi málinum at virka beinleiðis aftur á flokspolitiska arbeiðið í tinghúsinum, so stillaðu nógvar av teimum, ið tóku lut, upp til komandi løgtings- og kommunuvalini.

Tað var í 1964, at fyrsta kvinnan tók sæti á løgtingi. Tað var Malla Samuelsen í Sjálvstýrisflokkinum, men sum varaumboð sat hon bara eitt stutt skifti.

Í 1978 vórðu fyrstu kvinnurnar valdar í løgtingið at sita eitt heilt valskeið. Tær vóru Jona Henriksen í Javnaðarflokkinum (hon var varalimur 1975-78) og Karin Kjølbro í Tjóðveldisflokkinum.

Fyrsta kvinna í landsstýrinum var Jóngerð Purkhús, sum í 1985 varð tilnevnd landsstýriskvinna í fíggjar- og umhvørvismálum.

Í 1993 fingu føroyingar fyrsta og higartil einasta kvinnuliga løgmannin. Tað var Marita Petersen, sum var løgmaður frá januar 1993 til september 1994 fyri Javnaðarflokkin. Aftaná valið í 1994 varð Marita Petersen eisini sum fyrsta kvinnan vald sum løgtingsformaður.

Ein kvinna í Føroyum er vald í Fólkatingið. Tað var Lisbeth L. Petersen, sum varð vald í 2001.

Hugburðurin til politiskt virksemi er nógv broyttur hesi hundrað árini, liðin eru. Tónin kundi vera firtin og til tíðir niðrandi, tá kjakast var um, hvørt kvinnur skuldi fáa rætt at taka lut í politiskum arbeiði um aldaskiftið 1900. Men í dag siga allir flokkar seg hava sum mál at fáa kvinnum størri umboðan, og Demokratia arbeiðir tvørpolitiskt at fáa styrkt kvinnuumboðanina. Javnstøðulógin var fyrsta politiska barnið hjá kvinnum á tingi, lógin var samtykt í 1994, 15 ár eftir, at fyrstu kvinnurnar á tingi settu uppskot fram um javnstøðunevnd. Hon man eiga sín leiklut í broytta hugburðinum.

Kvinnur hava vunnið sær trygt sæti og hava sítt natúrliga pláss í lóggávuvaldinum, og so líðandi er talið á kvinnum á tingi vaksið. Í 1978 vóru tvær valdar, og í 1998 vóru tær 4, og hetta tíðarskeið vóru aðrar inni sum varalimir. Í 2015 vórðu 9 kvinnur á tingi, 27,3% av tingfólkinum. Tá samgongan var skipað, vóru tær 10 -ein knappur triðingur av teimum valdu, so útlit eru fyri veruligari javnstøðu í tingumboðanini. Hinvegin situr bert ein kvinna í teimum 7 landsstýrissessunum í dag.

Nakrir flokkar hava bundið seg at fremja javnstøðu í uppstilling, og tað tykist verða vanligt og virðiligt at javnstøða er innanflokka í uppstilling. Men gáttin tykist enn vera hægri hjá kvinnum, og tingkvinnur hava verið samdar um, at tað alla tíðina er neyðugt at arbeiða fyri at fáa kvinnur upp í politiskt arbeiði.

Óluva Klettskarð




FO 788-790

Royndarprent

# Vága floghavn – nýggjur terminalur

Tann 18. juni 2014 varð nýggi terminalurin á Vága floghavn tikin í nýtslu. Eitt nútímans bygningsverk í glasi og stáli, lagað til serstaka føroyska landslagið. Sambært arkitektunum er tað søgan hjá flogvøllinum, ið hevur givið íblástur til skapið á bygninginum – stóra bogaða tekjan er ein kvøða til ensku barakkirnar frá tíðini, tá bretar bygdu flogvøllin í fyrru helvt av øðrum heimsbardaga. Samstundis eru stórir glasveggir gjørdir inn móti flogvøllinum fyri at skapa kenslu av ferðing og opnum víddum.

Terminalbygningurin inniheldur stórt sæð tveir partar – eina ytri høll har ferðafólk koma til floghavnina – og eina størri stongda komu- og fráfaringarhøll handan innskrivingar- og trygdarpultarnar. Í mun til gamla terminalin, sum hevði eitt rættuliga avmarkað tollfrítt øki, er nýggja komu- og fráfaringarhøllin rúmlig og opin við tollfríum handlum og kaffihúsi til tey ferðandi.

Nýggi terminalurin er annað stig í útbyggingini, sum byrjaði í 2007, tá Føroyar yvirtóku flogvøllin frá donsku flogmyndugleikunum. Fyrsta stigið var at leingja lendingarbreytina úr 1250 til 1800 metrar – og at seta eina nútímans ILS-innflúgvingarskipan upp, so lendast kann í øllum veðri. Arbeiðið við at leingja flogbreytina varð liðugt í 2011 og hevur skapt munandi størri kapasitet til floghavnina, sum nú kann taka ímóti størri flogførum, veita betri reglusemi og betri trygd til flogførini.

Leingingin av lendingarbreytini førdi eisini við sær, at føroyska flogfelagið Atlantic Airways kundi seta størri flogfør inn á rutuna Vágar – Keypmannahavn og flúgva til ferðamál longur burtur í Evropa. Eitt Airbus 319 flogfar varð keypt í 2011 og longu fyrsta árið komu tvey flogfør av sama slag afturat til landið. Airbus flogførini hava gjørt tað lagaligari at ferðast, økt um kapasitetin og stytt um ferðatíðina millum Vágar og útheimin.

**Stutt um søguna hjá flogvøllinum**

Sum longu nevnt, var tað bretska hersetingarvaldið sum í 1942 byrjaði arbeiðið, at byggja flogvøll í Føroyum. Av ymsum orsøkum varð avgjørt at leggja hann við Sørvág í Vágunum, millum annað orsakað av tí stóra vatninum nærhendis har vatnflogfør eisini kundu lenda.




Mynd: Jógvan Helgi Hansen

Upprunaliga høvdu bretar ætlanir um ein flogvøll við trimum lendingarbreytum, men arbeiðið varð seinkað - og tá fyrsta lendingarbreytin stóð liðug á heysti 1943, var strategiski týdningurin av einum hernaðarflogvølli í Føroyum ikki tann sami. Tað endaði tí við tí einu lendingarbreytini, og tá RAF í september 1944 løgdu hernaðarflogstøðina niður, góvu teir føroyingum flogvøllin í gávu. Lendingarbreytin var tá 1096 metrar long.

Eftir kríggið var áhugi fyri regluligari flúgving til og úr Føroyum. Í 1946 var Føroya Flogfelag sett á stovn og byrjaði flúgving til og úr Keypmannahavn við millumlending í Prestwich í Skotlandi. Hendan fyrsta royndin, ið byrjaði 1. juli 1946, steðgaði longu í september sama ár, orsakað av fíggjarligum trupulleikum. Í desember 1946 keypti flogfelagið eitt flogfar til rutuna, men longu tríggjar dagar eftir at tað var komið til landið, fekk flogfarið skaða og kundi ikki umvælast.

Eftir hesa fyrstu miseydnaðu royndina lá flogvøllurin í órøkt í mong ár. Men í 1963 byrjaði íslendska felagið "Flugfélag Íslands" regluliga flúgving millum Danmark, Føroyar og Ísland. Lendingarbreytin á flogvøllinum varð umvæld og eitt hús við flogtorni, sum eisini var terminalur, varð bygt. Harafturat varð ein lítil brandstøð bygd við floghavnina.

Fyrst í sjeytiárunum byrjaði danska felagið Mærsk Air regluliga flúgving millum Kastrup og Vágar. Frá 1978 til 80 varð lendingarbreytin longd frá 1100 til 1250 metrar, so Mærsk kundi brúka jetflogfør á rutuni.

Í 1988 byrjaði nýstovnaða føroyska felagið Atlantic Airways at flúgva millum Vágar og Keypmannahavn við einum BAe 146 flogfari – og sama ár varð nýggjur terminalur bygdur við flogvøllin. Atlantic Airways vaks so líðandi og økti um flotan av flogførum og tyrlum – og í 2004 gavst Mærsk Air at flúgva til Føroyar.

Síðan hendi ikki tað stóra við flogvøllinum fyrr enn í 2007, tá føroyskir myndugleikar yvirtóku ábyrgdina frá donsku loftferðslumyndugleikunum. Flogvøllurin varð, sum longu nevnt, longdur, ILS-skipanin uppsett og nýggi terminalurin bygdur.

Anker Eli Petersen




# Ferðin hjá Atkinson í 1833




FO 804-807 Royndarprent

Tann 26. mai 1833 stevndi enski ferðahøvundin George Clayton Atkinson (1808-1877) úr Newcastle við skipinum Peggy ávegis til Føroya. Endamálið við ferðini var at granska náttúrusøgu. Serliga hevði hann áhuga fyri fugla-, jarð- og fólkalívsfrøði.

Árini frammanundan hevði hann ferðast í Hebridunum og í Hetlandi. Tá hann steig fótin á land í Føroyum var tað saman við tveimum øðrum, William Cookson og William Proctor. Ferðin til Íslands og til Føroya vardi góðar tríggjar mánaðir.

Ferðin hjá Clayton Atkinson er kanska heldur ókend her um leiðir, men tá Elisabeth II drotning kom á vitjan til Íslands í juni 1990, hevði hon ferðafrásøgnina *Journal of an Expedition to the Feroe and Westman Islands and Iceland 1833 by George Clayton Atkinson* við sum gávu til íslendska forsetan Vigdís Finnbogadóttir. Tað, sum ikki er so kent er, at Clayton Atkinson eisini ferðaðist í Føroyum, og at her finnast nakrar av teimum fyrstu og mest forkunnugu frágreiðingunum og myndunum vit hava - undir liðini á Stanley-ferðini í 1789 og La Recherche-ferðini til Føroya í 1839.

Tíðin millum Stanley-ferðina í 1789 og eitt nú ferðina við Mariu í 1854 (hesar ferðir gav Posta út sum frímerki) er ikki væl lýst av ferðandi. Her vóru einstakir ferðandi, m.a. týsk ferðandi og franska korvettin La Recherche, sum vitjaði víða í norðurlondum og í Føroyum (myndir frá teimum finnast eisini sum frímerki frá Posta). Tey fáu ferðandi vit finna í 18. øld og í byrjanini av 19. øld, løgdu nærum ongar tekningar og málningar eftir seg, tí er ferðin hjá Clayton Atkinson eitt høvuðsverk innan topografi, og serliga myndirnar eru forkunnugar.

Í tíðini undan Clayton Atkinsonsa ferð vóru Joseph Banks (1743-1820), Sir William Jackson Hooker (1785-1865) og skotin Sir George Steuart Mackenzie (1780-1848) teir mest kendu ferðandi, ið komu hendan vegin, eisini jarðfrøðingurin Walter Calverly Trevelyan (1822 & 1837). Clayton Atkinson kendi hesar ferðandi, ið komu undan honum. Eftir 1840'ini komu fleiri ferðandi henda vegin, eitt nú er vert at nevna ævintýraran Sir Richard Francis Burton, sum var her í 1875, eins og viktorianska designaran William Morris, sum kom til Føroya í 1871.



Fyrstu ferð Clayton Atkinson møtti føroyingum var umborð á einum fronskum loynihandilsskipi í Vágoy – sum bæði keypti og seldi vørur – og hansara meting var soljóðandi: føroyingar vóru bangnir fyri kolera og sótu tí í bátinum og høvdu ikki nógvan áhuga fyri peningi, men seldu skinn og mjólk og aðrar vørur. Fransar seldu reyðvín og cognac afturfyri: *"Teir vóru við vissu eitt løgið harkalið"*. Tá hann kom til Havnar helt hann, at staðið var fagurt; hann møtti eitt nú fútanum Christian Pløyen (1803–1867).

Øllum dámdu væl hendan Clayton Atkinson, og tey fylgdust við honum um alt landið. Eisini gekk kjakið lystiliga um felags áhugamál. Atkinson helt um føroyingar, at teir vóru erligir, trúgvandi, lærdir, og so vóru teir eisini vakrir – í hvussu so er, meðan teir vóru ungir. Annars vóru føroyingar sum: *"Damur og harrar øll onnur støð"*.

Clayton Atkinson var bæði málari og náttúrufrøðingur. Hann var ein ferðandi, sum leitaði eftir javnvág og klassiskum spírandi og romantiskum hugmyndum um vakurleika. Hansara skriviháttur vísti virðing fyri teimum, hann skrivaði um. Her minnir hann ikki sørt um ferðandi í 18. øld, so sum Sir John Stanley – ið vit ofta rópa fyri "gentleman"-ferðandi.

Myndirnar, sum eru valdar til føroyska fagnaðin av George Clayton Atkinsonsa ferð, eru fyrst teknaðar sum skitsur eftir Clayton Atkinson, seinni málaðar við vatnlitamyndum eftir Thomas Miles Richardson (1784-1848). Hann var ein kendur málari í Onglandi um tað mundið og varð ofta samanborin við mæta málaran William Turner. Á frímerkjaarkinum síggja vit eina føroyska vatnmyllu, Trøllkonufingur, Tórshavn og eina náttúrumynd úr Vágum, har vit m.a. eisini síggja Koltur og Hest. Í ferðafrásøgnini eru annars 29 plansjur í litum og 4 av fólkum. Minst fýra listafólk – ið vit vita um - hava teknað og málað myndir í hesum verkinum. Tey kendastu eru, umframt Clayton Atkinson sjálvan sum teknaði bæði fólk og fuglar, T. M. Richardson og Henry Perlee Parker, ið var eins kendur og Richardson. Eisini hevur sonur T.M. Richardson, George, málað fleiri av myndunum.

Kim Simonsen,
*Ph.d og Mag.Art*

# Vel ársins frímerki 2014 og vinn 2000,- kr




FO 776-778




FO 791




FO 786




FO 783




FO 779




FO 780




FO 781




FO 782




FO 787




FO 788




FO 789




FO 790



FO 792-795



FO 796



FO 797



FO 798



FO 799



FO 784-785

**1. vinningur er 2000,- kr.**

**2. vinningur er nýggja árbókin 2014**

**Harumframt hava vit 5 vinningar har vinnarin kann velja ímillum eina plakat av kópakonuni ella eina ársmappu 2013**

Klipp lepan út og send okkum hann ella atkvøð á www.stamps.fo

Seinasta freist at atkvøða er 15. mars 2015!

☑ **Ja,** takk. Eg vil fegin tekna meg fyri tíðindabrævið frá Posta Stamps, sum verður sent við telduposti.

**T-postur:** ______________________

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Postnr./Bygd: ______________________

______________________

______________________

Kundanr.: ______________________

**Ársins frímerki 2014 er:**

# Ársins endasøla

Hin 31. desember 2014 er seinasti søludagur fyri frímerkini og vørurnar á hesum síðum.

Hetta er tískil seinasti møguleiki, at ogna sær frímerkini fyri áljóðandi virði.

Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingar-lepanum mitt í blaðnum ella á heimasíðu okkara: www.stamps.fo.



FO 427



FO 688-689



FO 700



FO 701-702



FO 703-704



FO 708-709



FO 719-721



FO 718



FO 719-721



FO 722-723



FO 705-707



Kettur, sjálvklistrandi hefti
PPN000211



Jólasangir 2, hefti
PPN000911

## Ársmappa 2010



PPY002010

## Árbók 2010



Føroysk/donsk: PPZDKVI10
Ensk/týsk: PPZENVI10

## FDC-mappa 2010



FDM002010

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 23. februar 2015



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Magna Carta 800 ár** |
| Útgávudagur: | 23.02.2015 |
| Virði: | 24 kr. |
| Nummur: | FO 800 |
| Frímerkjastødd: | 24,9 x 42 mm |
| Lagt til rættis: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Miðalbrøv til Evropa, 51-100 gr. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Kvinnur valrætt í 100 ár** |
| Útgávudagur: | 23.02.2015 |
| Virði: | 36 kr. |
| Nummur: | FO 801 |
| Frímerkjastødd: | 40 x 45 mm |
| Design: | Edward Fuglø |
| Prenthátttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Stór- og miðalbrøv til onnur lond, 51-100 g |



Royndarprent



* hesi frímerki eru eisini givin út í hefti við átta frímerkjum

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Vága Floghavn** |
| Útgávudagur: | 23.02.2015 |
| Virði: | 8,50 og 15,00 kr. |
| Nummur: | FO 802-803 |
| Frímerkjastødd: | 30 x 40 mm |
| Myndir/snið: | J. H. Hansen / A. E. Petersen |
| Prenthátttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv í Føroyum, 0-50 g og stórbrøv í Føroyum, 51-100 g |


Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Ferðin hjá Clayton Atkinson í 1833** |
| Útgávudagur: | 23.02.2015 |
| Virði: | 4 x 8,50 kr. |
| Nummur: | FO 804-807 |
| Frímerkjastødd: | 30 x 40 mm |
| Stødd, ark: | 91 x 94 mm |
| Lagt til rættis: | Kim Simonsen og Anker Eli Petersen |
| Prenthátttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv í Føroyum, 0-50 g |

Framsíðumynd: Vága Floghavn - Myndamaður: Fróði Poulsen
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Find us on Facebook